# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarlógin 2009

Bíðað hevur verið í spenningi eftir fíggjarlógarálitinum, sum so at enda kom aftur úr fíggjarnevndini í gjárkvøldið. Síðan uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 2009 varð lagt fyri Løgtingið, eru fíggjarligu og búskaparligu fortreytirnar nógv broyttar. Uppskotið varð lagt fram, meðan búskaparliga virksemið enn var mestsum óbroytt og arbeiði var at kalla til allar hendur. Eftirfylgjandi hevur altjóða fíggjarkreppan elvt til eina búskaparkreppu, sum rakar allan heimin. Tað er serstakliga banka- og fíggingarkervið, sum er rakt, og ein avleiðingin er, at tað er vorðið sera trupult hjá vinnulívinum at fáa rakstrarfígging. Tey fyrstu álvarsomu krepputeknini eru longu komin fyri dagin. Skip eru løgd, virki farin gjaldsteðg og umleið tvey hundrað fólk vorðin arbeiðsleys bara hesa seinastu vikuna.

Hjá okkum er fiskivinnan akilleshælurin. Her hava trupulleikarnir leingi verið ávegis og uppskot til eina sera radikala loysn hjá CHE samgonguni vann ikki frama. Eftir politiska skrædlið eftir lásagøluna hevur ABC samgongan havt úr at gera við at finna síni egnu bein og áralagið hevur verið so sum so. Burtursæð frá nøkrum smærri broytingum í almannalóggávuni er heldur einki útspæl komið, men løgmaður hevur boðað frá, at landsstýrið kemur við eini váðalýsing av vinnulívinum, ið skal mynda støðið undir einum møguligum kreppupakka. Føroysku bankarnir eru við Løgtingsins vælsignilsi komnir undir donsku bankabjargingarskipanina. Tað ljóðar, at enn ein bankapakki er á veg, og einki er at ivast í, at føroysku bankarnir standa royndina og sostatt sleppa upp í hesa ætlaðu skipan, ið enn ikki er løgd fram.

Við øllum hesum trupulleikum í huga kundi ein óttast fyri, at meirilutin í fíggjarnevndini, sum hevur sitið við fíggjarlógaruppskotinum í alt heyst, fór at høgga bremsurnar í og harvið gera kreppuna verri. Hetta hevur nevndin ikki gjørt við tí álti, sum varð lagt fram í gjárkvøldið. Hinvegin hevur meirilutin ikki gjørt nakra veruliga roynd at skapa nýggjar fortreytir fyri einu kreppufyribyrgjandi fíggjar- og búskaparpolitikki. Meirilutin hevur flutt nakað av peningi frá rakstri til íløgur og hetta kann í fyrstu atløgu tykjast skilagott, um hetta tiltak kann medvirka til at varðveita ella skapa virksemi í økjum, sum nú eru hart rakt av búskaparligum trupulleikum og vinnuloysi.

Tað, sum stendur eftir er, at vit framvegis bíða eftir einum samlaðum útspæli frá ABC samgonguni til tess at byrgja fyri eini stórkreppu í Føroyum. Nú er lidnir fleiri mánaðir síðan fíggjarliga skrædlið í USA. Allar stjórnir hava síðan kýtt seg til tess at byrgja fyri kreppu og at bøta um avleiðingarnar fyri borgarar og vinnulív. Her í Føroyum er lítið og einki ítøkiligt hent uttan, at vit sluppu upp í donsku bankabjargingina. Við næstu fíggjarlóg, sum jú fer í gerð fyrsta dagin, eiga ítøkilig og vinnufremjandi tiltøk at fráboðast og at setast í verk. Fíggjarlógin er eitt amboð, ið einhvør stjórn eigur at nýta í eini kreppustøðu.

**Sosialurin**

## Viðmerking til Høgna Hoydal

**SOFUS DEBES JOHANNESEN**



Tað er ikki eiti á heiður, eg fái frá Høgna Hoydal, sum nýtir drúgva grein at viðgera nøkur viðurskiftir, eg nam við í lesarabrøvum herfyri.

Men eg hevði satt at siga roknað við, at tá ein formaður nýtir so nógva tíð upp á ein vanligan lim í øðrum flokki, so varð hetta gjørt meira seriøst enn hatta, Høgni Hoydal kemur við.

Fyrst vil hann vera við, at eg eri partur av skipaðum liði, ið skal bera í bøtuflaka fyri øllum, ið ABC-samgongan hevur og kemur at fremja. Hetta kenni eg onki til, og skal avgjørt afturvísa, at eg eri partur av nakrari skipaðari verju av nøkrum politikki. Havi bert nýtt mín rætt til alment at siga mína hugsan um nøkur mál. Hatta við skipaðari herferð við lesarabrøvum kenna vit bert til frá átakinum hjá framstandandi tjóðveldisfólki fyri nøkrum árum síðani, sum varð stýrt úr London.

Harnæst fer Høgni dekan ov lætt um sannleikan, tá hann umrøður tað, eg havi skrivað. Høgni Hoydal skriva m.a.: "M.a. førir Sofus fram, at Tjóðveldi hevur ábyrgdina av, at ongin koppseting verður móti lívmóðurhálskrabba..."

Eg havi ikki við einum orði ført fram, at Tjóðveldi hevur ábyrgdina av hesum. Tað einasta eg førdi fram var, at eg undrist á, at Tjóðveldi er hart ímóti at áleggja toll á sigarettir hjá ferðafólki, samstundis sum tey skjóta upp at áleggja landskassanum nýggjar útreiðslur. Tað er ikki at geva nøkrum ábyrgdina fyri nakað, men bert at vísa á nakað, ið eg meti sum eina mótsøgn!

Høgni heldur fram við at pástanda, at tað, at fólk fáa frádrátt fyri rentuútreiðslur til keyp av virðisbrøvum, skal vera "almenna tileggjan til lánsfíggjaða spekulasjón" og "her er ikki bara talan um múgvandi fólk, men vanlig fólk við meðalinntøku, sum av landsstýrinum og fíggjarstovnunum hava verið eggjað til at seta seg í hesa skuld".

Skal bara endurtaka, at eg haldi ikki, at hetta er eitt so stórur trupulleiki fyri vanliga føroyingin. Tíðindini í útvarpinum herfyri søgdu, at talan var um lán upp á einar 200 milliónir, og at tað vóru gott og væl 200 persónar, talan var um. Skjót høvuðrokning vísir, at í meðal hava hesi so lænt út ímóti eina millión, so talan er ikki um "vanlig fólk við meðalinntøku", sum Høgni Hoydal vil vera við. So mikið mátti roknikunnleikin hjá Høgna rokkið til.

Løgtingslógin um skatt av kapitalvinningi varð løgd fram av landsstýrismanni Tjóðveldisflokksins í 2001, og har varð sagt í almennu viðmerkingunum, at "Kapitalvinningsskattalógin er ein týðandi partur av Vinnuskattareforminum".

Talan er altso um vinnu, og vanligt er í vinnuligum virksemi, at frádráttur verður loyvdur fyri "útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna inntøkurnar, tryggja tær og halda teimum við" sum tað plagar at vera sagt í lógartekstinum. So út frá tí dugi eg onki forgjørt at síggja í, at loyvdur verður frádráttur fyri rentur til útvegan av virðisbrøvum, ið verða skattað eftir hesari lóg.

Høgni heldur, at her er talan "um greiðan sosialan ójavnað". Dugið ikki rættiliga at síggja hann her, men fara vit aftur til 2001, so vóru við hesari lógini nakrar inntøkur fluttar frá vanligu sjálvuppgávuni til at skattast eftir nýggju lógini um kapitalvinning. Tað hevði við sær, at hesar inntøkurnar hjá teimum, ið frammanundan høvdu stóra inntøku, nú blivu skattaðar við 35% í staðin fyri marginalskatting við yvir 50% áðrenn.

Tað er skattalætti, ið munar, ið varð latin teimum frammanundan múgvandi. Men hetta tekur Tjóðveldi sjálvandi ikki upp á tunguna nú, tað eru øll hini, ið fremja "greiðan sosialan ójavnað".

Høgni endar grein sína við at siga, at "Javnaðarflokkurin á landsfundi fegnast um altjóða fíggjarkreppuna...". Aftur her ein reingjan av veruleikanum, tí har var sjálvandi ongin, ið fegnaðist um kreppuna. Hinvegin vóru fólk fegin um góðu valúrslitini, ið javnaðarfólk høvdu fingið í fleiri kommunum, og tað kann ikki undra nakran, at fólk fegnaðust um tað.

At enda kann eg nevna, at síðani eg skrivaði lesarabrøvini herfyri er nýggj inntøkumeting komin frá Fíggjarmálaráðnum, sum nú vísir eitt hall upp á 580 milliónir í fíggjarlógaruppskotinum.

Tjóðveldi vildi í summar minka blokkin við 117 milliónum upp á tvey ár, og ein og hvør kann ímynda sær, hvussu støðan hevði verið í hesum landinum, um hesin flokkur slapp at halda fram í landsins leiðslu.

## Skeivt at spara tey bestu fólkini burtur

**HELGI MAGNUSARSON**

Tað eru aðrir mátar at spara, enn at siga tað besta fólkið upp. T. d. kundi ein persónur verið sendur til ítróttarhendingar uttanlands í staðin fyri, at ein útvarpar og ein tosar fyri sjónvarpið. Harafturat eru ofta viðmerkjarar við, sum vælsaktans skulu hava løn, uppihald o.a. goldið.

Havi hildið tað vera spell, at Jógvan Arge um umleið 6 - 7 ár vegna aldur skal sigast úr starvi, tí ein slíkan frásigara - bæði innan kappróður, hond- ella fótbólt, søguupplestur, bæði sjálvskrivað og eftir øðrum, finst ikki.

At hann so nú verður uppsagdur áðrenn fráfaringaraldur, er ein skandala.

Ove Olsen hevur nú í kanska 30 ár gjørt sera vælumtóktar tónleikasendingar. Hann hevur eina vitan um tónleik, sum er sera upplýsandi, og tað líkist ongum, at hann nú ikki verður at hoyra aftur. Eisini er tað óskiljandi, at ein teknikari, sum byrjaði av sínum eintingum at gera sendingar verður heimsendur.

Hava útbúgvin blaðfólk onki fakfelag sum kann gera nakað við uppsagnirnar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.